# Myanmar: Ótolandi viðurskifti hjá politiskum fangum

MANNARÆTTINDI
*Amnesty International*



*72 ára gamli Win Tin hevur sitið fongslaður síðani 1989*

Hóast viðurskiftini hjá politiskum fangum í Myanmar (Burma) helst eru bøtt síðani Reyði Krossur slapp at vitja fangarnar í 1999, er Amnesty enn ótrygt við fongsulsviðurskiftini og umstøðurnar sum heild.

Amnesty ger vart við, at píning enn kemur fyri, serliga í sambandi við avhoyringar.

Myndugleikarnir í Myanmar hava seinastu 18 mánaðirnar leyslatið fleiri enn 300 fangar. Sambært Amnesty eru tó í minsta lagi 1.350 politiskir fangar fongslaðir enn. Ein teirra er Win Tin, ein 72-ára gamal fyrrverandi blaðmaður og ráðgevi hjá Aung San Suu Kyi. Tað verður mett, at hann er illa fyri og hevur tørv á læknaviðgerð.

Meðan hann hevur sitið fangi, hevur Win Tin verið sjúkur fleiri ferðir og er versnaður av viðferðini, hann hevur fingið í fongslinum. Í sambandi við eina avhoyring í 1995 varð hann í fleiri mánaðir hildin í einum kliva ætlaður hernaðarhundum. Har noyddist hann at sova á berum betonggólvi og fekk hvørki mat ella drekka í dagar á rað.

Win Tin var áður við í leiðsluni av tjóðskaparligu demokratisku samgonguni í Myanmar. Hann varð fongslaður í 1989 fyri at hava vart eina kvinnu, sum hevði fingið framt fosturtøku ólógliga. Í fongslinum er Win Tin síðani dømdur tvær ferðir afturat fyri at hava "arbeitt politiskt í fongsli". Hann er dømdur í tilsamans 20 ára fongsul og situr í Insein fongslinum í Yangon.

# Nigeria: Stjórnin tosar við tveimum tungum

**Lagnan hjá Aminu Lawal er enn ógreið**

MANNARÆTTINDI
*Amnesty International*

Undan forsetavalinum, tjóðartingsvalinum og landspartavalinum í februar 2003 og Miss World kappingini í desember, er Amnesty ørkymlað av, at hægsti sharia-dómstólurin í Katsina landslutinum enn ikki hevur ásett ein dag fyri, nær kæran hjá Aminu Lawal verður viðgjørd.

Amnesty er bangið fyri, at ymsu boðini frá landsmyndugleikunum gera støðuna verri viðvíkjandi deyðarevsing, píning og aðari ómennskinsjansligari viðferð ella niðurgerandi revsingum í teimum landslutunum, sum nú innføra sharia-dómstólar.

– Tað tykist sum stjórnin tilvitað tosar við tveimum tungum - eini vendari ímóti fólkinum í Nigeria og eini mótvegis altjóða samfelagnum. Hóast lyftir hevur Obasanjo forseti enn onki ítøkiligt gjørt fyri at sharialógirnar í norðari landslutunum skulu samsvara nigeriansku grundlógini ella fylgja altjóða sáttmálum, segði Amnesty í einum tíðinaskrivi 14. november.

Hóast stóra altjóða trýstið eru deyðadómarnir enn í gildi fyri Aminu Lawal, Ahmadu Ibrahim, Fatimu Usman, Yunusa Rafin Chiyawa og Sarimu Mohammed. Ómenniskjansligar og niðurgerandi revsingar so sum stokkasløg og amputatiónir verða javnan avsagdar.

Ein av verjunum mótu sharialógunum hevur verið, at landslutirnir sjálvir sleppa at gera sínar lógir. Amnesty ger vart við, at hetta ikki ber til, tí sharialógirnar á fleiri økjum eru í stríði við bæði grundlóg landsins og við altjóða sáttmálar, sum Nigeria hevur bundið seg til.

# Jólaboð útkomin



*Guttorm Zachariasen í Havn hevur aftur í ár lagt Jólaboð til rættis*

JÓLABOÐ
*Tíðindaskriv*

Enn sum áður gevur bókadeildin hjá KFUM út Jólaboð við siðsøguligum greinum, yrkingum og søgum – bæði upprunaligar og týddar.

Gudrun Zachariasen sigur frá í endurminningum sínum, tá maður hennara, sum var lækni í Klaksvík 1916-1931, fór læknaferðir til Fugloyar og Oyrar, um vørutørv undir fyrra veraldarbardaga, og tá ið hon fyrstu ferð hitti verforeldur síni í Fugloy.

Sigvald Kristiansen sigur frá um Bartal í Króki á Strondum, sum fýra ára gamal fekk menigitis. Hetta merkti hann fyri lívið. Serliga verður greitt frá eini hending í 1940.

Carl Weihe, sum var uppvaksin við Norðskála, sigur okkum um Sundalagið, og hvat ið har var at fáa.

Benny Drewsen tekur okkum við á sínum fyrsta túri sum messudrongur við Elisabeth Nielsen. Eisini sigur hann okkum frá einum jólaaftan í 1955, og hvussu hann kom til trúgv á einum møti í Vanløse.

Bjarne Skaalum fer 60 ár aftur í tíðina og letur okkum hoyra um, tá ið afturskipið av Vardefjell kom á Vág í 1942.

Osmund Joensen fer heilt aftur í víkingatíðina. Vit hoyra, hvussu Torkel smíðar skip, um ferð hansara til Føroya, og at hann setur búgv í Sandavági. Osmund sigur eisini frá barkini Esmeraldu úr Bremen.

Ditlev Róin sigur frá Honnu, sum hann var granni hjá í uppvøkstrinum, og Nancy Vesturbú hevur yrkt ein sang um Havnina og gjørt lag til sangin.

Annars er hópin av søgum og yrkingum við andaligum innihaldi, sum hesi hava skrivað ella týtt: Theodor Hansen, Kjartan Stakksund, Effie Campbell, John S. Myllhamar, Torkil Bedder, Erling Poulsen, Johs. Andr. Næs, Ebba skaalum, Magnus Høgenni.

Inngangin hevur Martin Luther skrivað.

Janus Dam Guttesen og Høgni Würdig Larsen hava teknað til bókina, men annars eru eisini nógvar fotomyndir.

Perman er ein vøkur mynd av Havnar kirkju.




*Perman á Jólaboðum er ein vøkur mynd av Havnar kirkju, sum Høgni Würdig Larsen hevur teknað*

Høgni Würdig Larsen hevur teknað myndina.

Tað er Guttorm Zachariasen, sum aftur í ár hevur lagt Jólaboð til rættis.

Bókadeild KFUMs hevur sett bókina, Ívar Dam Guttesen umbrotið og Einars Prent prentað og heft.

Jólaboð eru 80 síður og kosta 90 krónur.

## Tøkk

Hjartaliga takka vit øllum fyri hjálpsemi og sýnda samkenslu, tá okkara kæri pápi, verfaðir, abbi og langabbi

**Aage Dahl**

andaðist og varð jarðaður.

Hjartans tøkk til tykkum øll, ið hjálptu til við jarðarferðina og ervið.
Tøkk fyri blómur og kransar og til tykkum, sum fylgdu honum til hansara seinasta hvíldarstað, og til tykkum, ið mintust Aaga á annan hátt.
Eisini ein hjartans tøkk til starvsfólkið á eldrasambýlinum Oman Hoydalar fyri góða røkt og umsorgan.

*Familjunnar vegna*
**Marita, Knud,**
**Annika, Eyðun og børnini**



